# Aldubáran væl mannað til Listastevnuna



*Vinstrumegin situr ein av nýggju limunum í Aldubáruni, Andras Olsen, sum spælir trombon. Við hansara lið situr Edvard Nyholm Debes, ið hevur skrivað eitt nýtt verk til Listastevnuna*

*Mynd: Maria Olsen*

**Trý nýggj verk frá føroyskum tónaskøldum eru á skránni, tá Aldubáran leygarkvøldið fer at hava konsert í Norðurlandahúsinum**

TÓNLEIKUR
*Stefan í Skorini*

Fleiri nýggir tónleikarar eru komnir við í Aldubáruna, nú fremstu klassisku tónleikararnir í Føroyum í næstum fara at hava forvitnisliga konsert í sambandi við Listastevnua, sum fer av bakkastokki í dag.

Tólv tónleikarar eru við í bólkinum hesuferð, og hetta er størsta talið síðan bólkurin byrjaði at spæla í 1995. Tá vóru sjey tónleikarar við.

Nýggj í bólkinum eru Andras Olsen á trombon og brøðurnir Rúni og Øssur Bæk á violin. Hetta er frystu ferð, at ljóðførið trombon er við í tónleikinum hjá Aldubáruni.

Rúni Bæk er júst liðugur á tónleikaskúla í New York, og hann flytir í næstum til Maleisia, har hann skal arbeiða sum tónleikari. Harumframt eru eisini fýra tónleikarar úr Íslandi og Danmark við hesuferð.

Onnu Klett barst frá at luttaka á hesi konsertini, tí at hon í hesum døgum skal framføra í Tivoli í Keypmannahavn. Hendan møguleikan fekk hon eftir at hava vunnið eina ummælaravirðisløn.

## Filmur og tónleikur

Á konsertini leygarkvøldið verða trý nýggj verk, sum eru skrivað av føroyskum komponistum, framførd.

Talan er um City Pictures eftir Edvard Nyholm Debes, Melodrama eftir Trónd Bogason Hansen og Four Gardens eftir Sunleif Rasmussen. Hesi verk hava ongantíð verið framførd áður. Verkini hjá Edvardi og Tróndi hevur Listastevnan bílagt til júst hetta høvið.

– Tað er mangan torført at siga nakað um sín egna tónleik, men eg kann siga hvørjum eg havi fingið íblástur av til verkið, og tað eru býarmyndir, sum heitið eisini ber boð um, sigur Edvard Nyholm Debes um sítt verk.

Hann hevur í hesum sambandi flættað ein film inn í framførsluna av verkinum. Hesin filmurin vísir nakrar býarmyndir frá einum knútapunkti í høvuðsstaðnum tó uttan av avdúka, júst hvat fer fram í filminum. Hetta er ein forvitnislig samanblanding av klassiskum tónleiki og filmi.

Verkið hjá Sunleivi Rasmussen er eitt preludium til eina komandi opera, sum sandingurin arbeiðir við í løtuni.

Harumframt verða verk eftir György Ligeti og Béla Bartók, báðir úr Ungarn, framførd.

## Knýta nýggjar tónleikarar at sær

Ólavur Jakobsen, sum spælir gittar í Aldubáruni, heldur, at tað er umráðandi, at ungir og nýútbúnir tónleikarar verða knýttir at bólkinum.

– Endamálið hjá okkum er at økja um talið av tónleikarum í bólkinum, og vit royna at innlima nýggjar tónleikarar so hvørt, sigur Ólavur Jakobsen. Langtíðarætlanin hjá bólkinum er at gera eitt lítið klassiskt orkestur við dirigenti.

Dirigentur hesuferð verður íslendingurin Bernharður Wilkinson, sum hevur sera nógvar royndir á tí økinum, og hann hevur áður samstarvað við Aldubáruna.

Bernharður ella Benny, sum tónleikararnir kalla hann, flytir til Føroyar í næstum, her hann skal búgva í eitt ár, og vónandi verður ein góður fongur hjá føroyskum tónleikalívi.

## Flyta seg undir konsertini

Eitt annað áhugavert við konsertini hjá Aldubáruni er, at tónleikararnir fara at flyta seg undir framførsluni.

Ætlanin er, at tónleikararnir skulu skifta pláss av og á, so at tey ymsu ljóðini frá ljóðførunum koma ymsastaðni frá í salinum. Hetta fer eftir ætlan at gera tað meira spennandi hjá áhoyrarunum.

Aldubáran í Norðurlandahúsinum leygarkvøldið klokkan 19.30.

### Manningin

Andrea Heindriksdóttir, floyta
Eydís Franzdóttir, obo
Ármann Helgason, fagott
Páll Sólstein, horn
Andras Olsen, trombon
Sámal Petersen, violin
Rúni Bæk, violin
Øssur Bæk, violin
Uffe Wissing, viola
Frederik Waage, cello
Ólavur Jakobsen, gittar
Jóhannes Andreasen, klaver



listastevna føroya arts festival

# Eivør við nýggjum tilfari



*Eivør Pálsdóttir sendir í næstum nýggja fløgu á marknaðin, sum er givin út á íslendskum plátufelag*

*Mynd: Maria Olsen*

**Í heyst kemur nýggj fløga við Eivør Pálsdóttir og íslendska bólki hennara á marknaðin, og tey fara at framføra nøkur av hesum løgunum á Listastevnuni**

TÓNLEIKUR
*Stefan í Skorini*

– Tað er umráðandi at fáa tað út, sum man hevur innaní sær sjálvum, og tí er tað neyðugt hjá mær at geva hesa fløguna út, sigur Eivør Pálsdóttir um komandi fløgu sína.

Nú eru longu fýra ár síðani hon gav eina fløgu út í egnum navni, og nú er tíðin aftur búgvin til enn eina útgávu.

Eivør hevur sjálv smíðað øll løgini á fløguni uttan tvey skjaldur, sum eisini eru við. Harumframt hevur hon skrivað allar tekstirnar, sum eru á føroyskum.

Tað er íslendska plátufelagið Tólv Tónar, sum gevur plátuna út, og Eivør hevur saman við bólkinum verið í Rainbow Studio í Oslo og tikið fløguna upp.

– Tað hevur altíð verið ein dreymur hjá mær at sloppið í júst hetta studio at taka upp, tí hetta er eitt av teimum bestu upptøkuhølunum um okkara leiðir, sigur Eivør, sum bert nýtti fýra dagar í upptøkuhølunum.

Hetta er heldur stutt tíð, men um tónleikararnir eru væl fyrireikaðir, so ber tað til at taka eina eina fløgu upp eftir fýra døgum.

## Royndir tónleikarar

At framføra sín tónleik hevur Eivør fingið tríggjar royndar íslendskar tónleikarar. Hesir eru Petur Gretarsson á trummum, Birgir Bragason á kontrabassi og Edvardi Laurusson á gittar.

– Hetta eru allir tilkomnir menn og royndir tónleikarar, sum undirvísa á tónleikaskúla í Reykjavík. Eg leitaði eftir royndum tónleikarum til hesa fløguna, greiðir Eivør frá.

Fleiri íslendsk plátufeløg lógu framvið og vildu geva eina fløgu við Eivør út, men hon valdi at enda Tólv Tónar. Orsøkin til tess var, at hetta plátufelagið ikki hevur so nógv onnur jørn í eldinum, og tí kundi hetta felagið leggja alla sína orku í júst hesa fløguna.

## Fólkatónleikur

Tónleikurin á fløguni líkist nakað tónleikinum á tí fyrru fløguni hjá Eivør, sum kom út fyri fýra árum síðani.

– Man kann samanbera hesa fløguna við ta fyrru, men tað er ein menning farin fram, og tónleikararnir eru ikki teir somu, sigur Eivør Pálsdóttir.

Hon hevur arbeitt við hesi fløguni í eitt ár ella so, og Eivør greiðir frá, at hon hevur ligið inni við nógvum tilfari til hesa fløguna. Væntandi verða tíggju løg á fløguni.

Í gjár fór Eivør aftur til Íslands, har hon skal leggja seinastu hond á fløguna, sum verður framleidd í næstum. Hon kemur síðani aftur til Føroya, og hon skal tann 13. august hava konsert í Norðurlandahúsinum og tann 14. august er konsert í Mentanarhúsinum í Fuglafirði.

Eivør nevnir eisini, at hon nú hevur fingið sín egna persónliga klædnadesignara. Tað er Svanhild Strøm, sum fyri stuttum er útbúgvin designari á designskúlanum Teko í Herning. Eivør fer á sínum framførslum at vera í klæðum frá Svanhild.

# Victoria Chaplin komin til landið

LISTASTEVNAN
*Ingrid Bjarnastein*

Victoria Chaplin, sum er dóttir víðagitna Charlie Chaplin, kom saman við manninum Jean Baptiste Thierée til Føroya mánadagin.

Djórini komu eisini mánadagin, og í dag, mikudag, og í morgin verða sýningar í høllini í Norðurlandahúsinum undir heitinum »Le Cirque Invisible«, sum er ein partur av Listastevnu Føroya 2003.

Upplýst verður frá Norðurlandahúsinum, at atgongumerkini ganga sum heitt breyð, so um onkur ætlar sær at uppliva djórini og ósjónliga sirkus teirra, so er at skunda sær.



*Victoria Chaplin, dóttir Charlie Chaplin, kom mánadagin til Føroya*

*Mynd: Jens Jákup Hansen*